

# Aðalstjóri

## Aðalstjóri til Mentamálaráðið

Aðalstjórin verður ovasti ráðgevi hjá landsstýriskvinnuni í mentamálum og fer at hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni, menningini og rakstrinum av Mentamálaráðnum. Økið fevnir um: undirvísingarmál, gransking, mentamál, kirkjumál, loftmiðlar, ítrótt og annað frítíðarvirksemi.

**Høvuðsuppgávur:**

- Leiða og samskipa arbeiðið í ráðnum
- Samskipa og fyrireika uppgávur í omanfyri nevndu málum
- Fyrireika lógir, kunngerðir og reglugerðir innan virkisøkið
- Eftirlit við stovnum undir Mentamálaráðnum
- Aðrar viðkomandi uppgávur, sum hoyra virkisøkinum til

**Førleikakrøv**

Kravt verður, at umsøkjarin hevur kandidatútbúgving frá lærdum háskúla og leiðsluroyndir frá tí almenna ella privata arbeiðsmarknaðinum. Umráðandi er, at tann, ið verður settur, hevur góð evni at samstarva og samskifta, umframt at seta greið mál og skapa úrslit. Viðkomandi skal duga at síggja heildir uttan at missa burtur týdningarmiklar smálutir og skal kunna arbeiða við nógvum málum í senn. Viðkomandi skal duga væl at raðfesta, samskipa og útdelegera.

Tann, ið verður settur, skal hava gott innlit í politisk viðurskifti og vitan um tær treytir, ið eru galdandi í eini politiskari fyrisiting.
Týdningarmikið er, at viðkomandi hevur vilja og hegni at ganga nýggjar leiðir.

**Setanarviðurskifti**

Starvið er tænastumannastarv, starvsheitið er aðalstjóri og er flokkað í 39. lønarflokki. Harumframt er ein mánaðarlig viðbót uppá 4.375, 28 kr. Viðbótin er ikki eftirlønargevandi. Setanarøkið fevnir um Mentamálaráðið, stovnar undir tí, Løgmansskrivstovuna og hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin er í løtuni Mentamálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, tlf. 55 10 30.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig viðmæli skulu stílast til løgmann, og sendast Løgmansskrivstovuni, Marjuni Hanusardóttur, løgmansstjóra, postsmoga 64, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 25. august 2008 kl. 12. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vit draga eina línu • Vit seta skynsemi í hásæti • Vit vilja vita • Vit bróta slóð

Mentamálaráðið er eitt av stjórnarráðunum í miðfyrisitingini, sum veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Miðfyrisitingin er fremst í nýskapan, arbeiðslagi og samskifti. Landsstýrismaðurin í mentamálum umsitur málsøkini skúli, gransking, mentan, kirkja, loftmiðlar, ítrótt og annað frítíðarvirksemi.

**Mentamálaráðið**